# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Bjarni Rubek Nielsen 60 ár




Nýggjársaftan fyllir Bjarni Rubek Nielsen í Snoldelev í 60 ár.

Bjarni er havnarmaður, føddur í Keypmannahavn 31. desember 1944.

Hann vaks upp í Havn, bleiv útbúgvin tekniskur assistentur í 1967 og radiomekanikari í 1968. Hann lærdi til radiomekanikara á radioverkstaðnum hjá Oliver Næss við Hoydalsvegin.

Í 1968 læt hann upp eina kenda grillbarr í N. Finsensgøtu í Havn, sum hann hevði í mong ár.

Frá 1972-76 arbeiddi hann á Loranstøðini á Eiði.

Hann koyrdi eisini nógv hýruvogn á bilstøðini Auto bæði sum avloysari og við egnum hýruvogni.

Síðan 1978 hevur Bjarni búð í Danmark, har hann hevur lært til elektronikkteknikara.

Hann arbeiddi í mong ár sum tænastustjóri á eini fyritøku sum selur bilstereoanlegg.

Bjarni hevur altíð verið virkin innan svimjing og fimleik, bæði tá hann búði í Føroyum og síðan hann flutti til Danmarkar. Hann hevur luttikið í nógvum kappingum og er eitt nú nevndarlimur í Roskilde Atletklub.

Foreldrini hjá Bjarna vóru: Kathrina, f. Joensen, ættað úr Sørvági, og Børge Rubek Nielsen úr Havn.

Bjarni er giftur við Rigmor, f. Østergaard, og tey eiga fýra børn: Bergur, 27 ár, Peter, 14 ár, Kathrine, 10 ár, og Anne Sofie, sum fyllir 7 ár mikudagin. Familjan býr Snoldelev, 10 km uttan fyri Roskilde.

Føðingardagurin verður hildin nýggjársaftan.

Adressan hjá Bjarna er: Engsdraget 10, DK-4621 Gadstrup. Tel. 0045 51969211.

### Klæmint Weihe, stjóri:

## 25 ára starvsdag hjá SEV



1. januar 2005 hevur Klæmint Weihe, stjóri, 25 ára starvsdag hjá elfelagnum SEV.

Klæmint er 54 ára gamal og sørvingur. Eftir at hava tikið realskúlaprógv kom hann til Havnar, har hann fór í læru sum radiomekanikari hjá Marstein brøðrunum í Havn frá 1967-71.

Síðan fór hann til Danmarkar at lesa til veikstreymsverkfrøðing, og varð hann liðugur við hesa útbúgving í 1976.

Frá 1977-79 arbeiddi hann sum verkfrøðingur í Danmark hjá fyritøkunum Datasaab og Chr. F. Rovsing. 1. januar 1980 fekk hann starv sum verkfrøðingur hjá elfelagnum SEV í Havn, og síðan 1983 hevur hann verið stjóri á SEV og verið limur í umboðsráðnum hjá SEV.

Hann hevur verið nevndarlimur í t.d. Føroya Banka, Hitafelagnum og Fjarhitafelagnum og í P/f Vágatunnlinum, har hann var formaður.

Seinastu tíðina hava vit hoyrt mest um Klæmint sum nevndarformann í Smyril Line.

Klæmint er sonur Karolinu, f. Joensen, og Petur Weihe í Sørvági. Hann er giftur við Ketty, f. Dam, úr Havn, tey eiga tvey børn: Karin, sum býr í Holbæk, og Heðin, sum býr í Havn.

Í sambandi við starvsdagin verður almenn móttøka hjá SEV við Landavegin fríggjadagin 7. januar 2005.

### Bilfríðkan á Hjalla:

## Eli Davidsen keypti bil nr. 100

**Leygardagin 15. mai 2004 læt Bilfríðkan upp stóra brúktbilasølu á Hjalla við góðum brúktum bilum, og mikudagin 29. desember varð brúkti bilur nr. 100 seldur**




*Mikudagin 29. desember varð brúkti bilur nr. 100 seldur hjá Bilfríðkan á Hjalla. Eigarin av bilinum var Eli Davidsen í Æðuvík, sum her fær eitt gávukort og blómuryssi frá stjóranum Ludvík Petersen (v.m.). Á myndini eru eisini Fía Rubeksen og sonurin, Jógvan Martin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tá Eli Davidsen í Æðuvík, saman við familjuni, kom til Bilfriðkan á Hjalla at heinta sín Toyota Avensis stationcar 2,0 diesel frá 2001 seinasta mikudag, visti hann ikki, at hann var kundi nr. 100 hjá brúktbiladeplinum Bilfríðkan á Hjalla.

Í hesum sambandi handaði stjórin, Ludvík Petersen, honum eitt blómutyssi og eitt gávukort frá ferðaskrivstovuni Faroe Travel, sum var ein apex-ferðaseðil til Danmarkar við Atlantic Airways.

Eli Davidsen arbeiðir sum timburmaður í Danmark, so gávukortið kom væl við hjá honum.

Ludvík Petersen sigur, at sølan av bruktu bilunum hevur gingið nógv betur enn væntað. Hann roknaði við at selja umleið tveir bilar um vikuna, men higartil í ár hevur hann selt umleið fýra bilar um vikuna.

Hann heldur at ein orsøk til góðu søluna kann vera, at fyritøkan virkar sum ein brúktbiladepil við góðum brúktum bilum, og at hann hevur lagaliga fígging.

Umstøðurnar eru góðar, og nógv ferðsla er inn á Hjalla, sum er tætt við høvuðsvegin til og frá Havnini. Eisini er nógv ferðsluni til nærmastu grannarnar, Litaval og Brennistøðina á Hjalla.

Við tað at tað er sera friðarligt í januar, hava vit valt at fara í vetrarfrí, og fyritøkan verður tí stongd frá 6. til 24. januar 2005, sigur Ludvík Petersen.